SPEKT | løggildir grannskoðarar

# Ríðisamband Føroya

100 Tórshavn

# Ársroknskapur fyri 2024

Staravegur 17, Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34

Stangaskákið 1, Postboks 346
FO-710 Klaksvík
Telefon 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Sp/f 2732

## INNIHALDSYVIRLIT

| | SÍÐA |
|---|---|
| UPPLÝSINGAR UM SAMBANDIÐ | 2 |
| ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR | 3 |
| GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 4 |
| NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 6 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR | 7 |
| FÍGGJARSTØÐA | 8 |
| NOTUR | 9 |

## UPPLÝSINGAR UM SAMBANDIÐ

Ríðisamband Føroya
Rygsgøta 4
160 Argir

**Nevnd**

Brandur í Dali, formaður

Zacharias R. Jacobsen, næstformaður

Valborg H. Laksafoss

**Grannskoðan**

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

**Peningastovnur**

P/F Føroya Banki

**Ársaðalfundur**

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.

## ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevndin hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2024 fyri Ríðisamband Føroya.

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2024, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn, hin 13. mai 2025

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Brandur í Dali | Zacharias R. Jacobsen | Valborg H. Laksafoss |
| *formaður* | *næstformaður* | |

Hesin roknskapur er framlagdur og góðkendur av aðalfundi sambandsins

hin 13/5 - 2025

______________________
(fundarstjóri)

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til Ríðisamband Føroya**

# Grannskoðanarátekning á ársroknskapin

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ríðisamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2024 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av samtakinum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini.

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanaráteknigini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða, og samskifta um týðandi eygleiðingar, so sum møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit koma fram á í sambandi við grannskoðanina.

Tórshavn, hin 13. mai 2025

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársroknskapurin fyri Ríðisamband Føroya er gjørdur eftir avsetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A við teimum tillagingum, sum nevndin hevur mett neyðugar. Einasta tillaging í mun til ársroknskaparlógina er, at íløgur í materiella støðisogn verða útreiðsluførdar og harvið ikki verða tiknar við sum ognir í fíggjarstøðuni. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at sambandið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at sambandið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

### Inntøkur
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, tá ið goldið verður í bankan. Inntøkur undir Egingjøld eru útreiðslur sum luttakarar til ymiskar altjóða kappingar hava goldið, hesar verða tiknar við í tí ári tær viðvíkja.

### Útreiðslur
Útreiðslur verða tiknar við í tí árið tær viðvíkja. Útreiðslurnar fevna um kostnaðir í sambandi við Lands- og FM-kappingar, stuðul til limafeløg, felagsútreiðslur og umsitingarligar útreiðslur. Harumframt verða íløgur í t.d. rakstartól útreiðslurførd. Ùtreiðslur undir Egingjøld eru útreiðslur sum luttakarar til ymiskar altjóða kappingar sjálvir hava goldið, hesar verða tiknar við í tí ári tær viðvíkja.

### Starvsfólkakostnaður
Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

### Skyldur
Skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði.

## RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 2024

| | Nota | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **Inntøkur** | | | |
| Landskassastudningur frá ÍSF | | 679.462 | 556.346 |
| Inntøkur fyri skeið | | 2.796 | 0 |
| Egingjøld ísv. kappingar uttanlands | 5 | 411.053 | 240.088 |
| | | 1.093.311 | 796.434 |
| **Útreiðslur** | | | |
| Útreiðslur Lands- / FM-Kappingin, leiga | 1 | -210.000 | -260.000 |
| Útreiðslur Lands-/FM-Kappingin, útgerð | 2 | -45.891 | -51.423 |
| Útreiðslur Lands-/FM-Kappingin, ferðakostnaður | | -54.313 | -17.975 |
| Útreiðslur Lands-/FM-Kappingin, heiðursmerkir | | -3.144 | -5.422 |
| Útreiðslur Lands-/FM-Kappingin, annað | | -15.858 | 0 |
| Útreiðslur manslandslið, ferðakostnaður | | -53.386 | -70.327 |
| Útgerð til venjarar | | -3.557 | 0 |
| Útreiðslur til ungdómslandsliðið, annað | | 0 | -4.030 |
| Útreiðslur til skeið, ferðing og koyring | 3 | -25.846 | -24.805 |
| Kostur í útlandinum | | 0 | -5.584 |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | | -150.860 | -49.884 |
| Felagsútreiðslur, fundarútreiðslur | | 0 | -2.413 |
| Starvsnevndarfundir | | -3.263 | 0 |
| Umboðan | | -410 | 0 |
| Felagsútreiðslur, heimasíða | | -9.137 | -5.037 |
| Felagsútreiðslur, annað | | -40.000 | 0 |
| Fyrisitingarútreiðslur, grannskoðan og roknskaparhjálp | | -16.250 | -13.750 |
| Fyrisitingarútreiðslur, aðrar útreiðslur | | -3.589 | -1.830 |
| Gávur og graveringar | | -0 | -590 |
| Egingjøld ísv. kappingar uttanlands | 5 | -411.053 | -240.088 |
| Til samans | | -1.046.557 | -753.158 |
| **Starvsfólkaútreiðslur** | | | |
| Lønir, ungdómslandslið og dómarar | | -70.000 | -70.000 |
| Eftirlønir | | -7.600 | -7.200 |
| Lønartengd gjøld | | -1.543 | -3.869 |
| Til samans | | -79.143 | -81.069 |
| Rentuútreiðslur | | 0 | 0 |
| | | -834.227 | -834.227 |
| **Ársúrslitið** | | -32.389 | -37.793 |

Skotið verður upp at flyta ársúrslitið til næsta ár.

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2024

| | Nota | 31/12 2024 kr. | 31/12 2023 kr. |
|---|---|---|---|
| **OGN** | | | |
| **Ogn í umferð** | | | |
| Onnur áogn | | 0 | 0 |
| Tøkur peningur | | 3.372 | 46.441 |
| **Ogn í umferð til samans** | | 3.372 | 46.441 |
| **OGN TIL SAMANS** | | 3.372 | 46.441 |
| | | | |
| **SKYLDUR** | | | |
| **Eginogn** | | | |
| Eginogn 1. januar | | -49.122 | -11.329 |
| Flutt úrslit | | -32.389 | -37.793 |
| **Eginogn til samans** | | -81.511 | -49.122 |
| **Skuld** | | | |
| Útvegarar av vørum og tænastum | | 84.696 | 95.376 |
| Innsavning | 4 | 187 | 187 |
| **Skuld til samans** | | 84.883 | 95.563 |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | 3.372 | 46.441 |

## NOTUR

| | 31/12 2024 kr. | 31/12 2023 kr. |
|---|---|---|
| **Nota 1 Útreiðslur Lands- / FM-Kappingin, leiga** | | |
| Føroyskt Íslandsrossafelag | 80.000 | 100.000 |
| Føroya Ríðingafelag | 70.000 | 90.000 |
| Vága Ríðingarfelag | 60.000 | 70.000 |
| **Til samans** | 210.000 | 260.000 |
| | | |
| **Nota 2 Útreiðslur Lands- / FM-Kappingin, útgerð** | | |
| Startur | 4.090 | 13.623 |
| Bilur | 61.801 | 35.000 |
| Søla av vogni | -20.000 | 0 |
| Kameraútgerð | 0 | 2.800 |
| **Til samans** | 45.891 | 51.423 |
| | | |
| **Nota 3 Útreiðslur til skeið, ferðing og koyring** | | |
| Ferðing og koyring | 25.846 | 22.198 |
| Skeið til at brúka útgerð | 0 | 0 |
| Dómaraskeið | 0 | 2.607 |
| **Til samans** | 25.846 | 24.805 |
| | | |
| **Nota 4 Innsavning Krabbameinsfelagið** | | |
| Inngjøld | 0 | 0 |
| Útgjøld | 0 | 0 |
| Flutt frá undanfarna ár | 187 | 187 |
| **Til samans** | 187 | 187 |

## NOTUR

| Nota 5 Egingjøld ísv. landsliðsumboðan | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| Ridning/Rakel | 17.348 | 26.188 |
| Ester Dahl á Heygum | 47.364 | 54.669 |
| Bertha Maria Nordendal | 0 | 58.764 |
| Elin Virgarsdóttir Tindskarð | 0 | 34.820 |
| Knút Lutzen | 55.258 | 65.647 |
| Jason | 31.018 | 0 |
| Elma | 31.601 | 0 |
| Óluva | 68.855 | 0 |
| Valborg | 55.537 | 0 |
| Ragnheiður | 63.822 | 0 |
| Ranja | 40.250 | 0 |
| **Til samans** | 411.053 | 240.088 |

**Nota 6 Framtíðarútlit**

Eginogn felagsins er negativ við 82 tkr. í árslok í 2024. Felagið væntar yvirskot av rakstrinum í 2025 og ætlanin er at endurreisa eginpeningin við yvirskotum í framtíðini.